# ítróttur

Nr. 29 • fríggjadagur • 11. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Argja Róðrarfelag heiðrað

**Á samkomu á Dimmalætting mikukvøldið var avdúkað, at lesararnir hjá Dimmu høvdu valt Argja Róðrarfelag til at hava framt ársins ítróttarbragd 2004**


ÍTRÓTTARBRAGD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Fimm ymisk ítróttarfólk, lið ella feløg vóru í uppskoti til ársins ítróttarbragd, sum lesararnir hjá Dimmu so kundu velja millum. Umframt Argja Róðrarfelag vóru tað flogbóltsspælarin Rúni Weihe, kvinnulandsliðið í hondbólti, 1. deild menn hjá HB og súkklarin Gunnar Dahl Olsen.


*Emil L. Jacobsen, h.m., ítróttarskrivari á Dimmalætting, handar her formanninum í Argja Róðrarfelag, Sigurd Andreasen, heiðursskjal og blómur í sambandi við, at felagið vann heiðurin at hava framt ársins ítróttarbragd 2004*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Vunnu trý føroyameistaraheitir**

Tað var royndi ítróttarskrivarin á Dimmu, Emil L. Jacobsen, ið avdúkaði, hvørji trý tey fremstu í atkvøðugreiðsluni vóru.

Nummar trý gjørdist kvinnulandsliðið í hondbólti, sum í fjør vár gjørdist nummar tvey í Challenge Cup Trophy kappingini í Italia.

Næstfremstur gjørdist flogbóltsspælarin Rúni Weihe, sum fór til Tromsø í lestrarørindum, og so fór at spæla flogbólt við Tromsø, sum í fjør gjørdist bæði norskur meistari og steypavinnari.

Vinnarin av ársins ítróttarbragdi gjørdist sum áðurnevnt Argja Róðrarfelag, ið hevði fingið 27 prosent av atkvøðunum. Argja Róðrarfelag hevði eitt framúr gott róðrarár í fjør, tá ið felagið vann trý av teimum seks føroyameistaraheitunum, ið kappast verður um í kapproðri.

5-mannafarið Blikur hjá argjamonnum gjørdist føroyameistari bæði hjá gentum og dreingjum, og flaggskipið hjá felagnum, Argjabáturin, gjørdist føroyameistari hjá 8-mannaførunum, har báturin vann allar róðrarnar uttan ólavsøkuróðurin.

Eftir at heiðursskriv og blómutyssi var handað formanninum í Argja Róðrarfelag, Sigurd Andreasen, tók forsetin í Ítróttarsambandi Føroya, Heðin Mortensen, orðið. Heðin er gamal róðrarmaður, og hann greiddi eitt sindur frá søguni hjá Argja Róðrarfelag, og hann bar eisini vegna ÍSF eina heilsu til øll hini, ið vóru í uppskoti, tí tey eisini høvdu tænt føroyskum ítrótti í 2004.

# Niclas aftur í KÍ

**Sterki verjuleikarin, Niclas Niclasen, sum eftir farna kappingarár skifti úr KÍ til B36, er nú aftur farin at venja í Klaksvík**


SPÆLARASKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Seint í heyst boðaði B36 frá, at felagið hevði gjørt avtalu við sterka verjuleikaran hjá KÍ Niclas Niclasen fyri komandi kappingarár. Nú kappingin nærkast, er støðan tó ein onnur, og Niclas er farin aftur til Klaksvíkar og KÍ.


*Nú bendir alt á, at sterki verjuleikarin, Niclas Niclasen, komandi kappingarár framhaldandi verður at síggja í bláu troyggjuni hjá KÍ*

**Støðan eitt sindur fløkt**

Søgan er tann, at Niclas í sambandi við arbeiðsviðurskifti síni flutti til Havnar, og tí valdi hann at skifta til B36, sum hann so gjørdi sáttmála við. Nú eru arbeiðsviðurskiftini broytt, uttan at Niclas hevur havt nakra ávirkan á tað, og tí er hann fluttur aftur til Klaksvíkar og arbeiðir har norðuri.

Seinastu vikurnar hevur Niclas tí vant við KÍ, og formaðurin í fótbóltsdeildini hjá KÍ, Símun Gullaksen, sigur, at teir rokna við honum komandi kappingarár, og felagið hevur eisini bjóðað Niclas sáttmála fyri komandi kappingarár, sum hann hevur tikið av.

Trupulleikin er tó tann, at Niclas kann ikki gera sáttmála við KÍ, fyrr enn hann er blivin leysur av sáttmála sínum við B36. Formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, sigur, at felagið hevur sáttmála við Niclas, og at hann ikki enn hevur sagt sáttmálan upp. Formaðurin í B36 sigur tó, at støðan er eitt sindur fløkt, og at Niclas er púra ósekur í tí, sum er farið fram.

– Tað er ein keðilig støða, sum Niclas er komin í, men vit fara at seta okkum niður og tosa um tingini, og saman við honum fara vit óivað at finna út av tí, sigur Kristian á Neystabø. Sum tað skilst á formanninum í B36, so tykist tað ikki verða nakað ivamál um, at árstalsfelagið, Niclas og KÍ í felag fara at finna eina loysn, sum allir partar kunnu góðtaka.

## Nýggjur stjóri í Ítróttavedding sp/f

Nevndin í Ítróttavedding hevur sett Petur Elias Petersen sum stjóra frá 1. februar 2005 at rokna.

Heðin Mortensen, hevur søkt um at fáa farloyvi úr starvi sínum sum stjóri í Ítróttavedding, nú hann er vorðin borgarstjóri í Tórshavn.

Til kunnleika kann nevnast at umsetningurin og tað sum føroyingar spældu fyri í 2004 hjá Dansk Tipstjeneste er á sama støði sum undanfarin ár.

Í 2004 útlutaði Ítróttavedding 9,5 mió krónur til føroysk ungdómsarbeiði, sum varð býtt soleiðis samb. almenna býtislyklinum:

**Ítróttasamband Føroya** 60% svarandi til kr. 5,7 mió kr.

**Føroya Ungdómsráð** 20% svarandi til kr. 1,9 mió kr.

**Mentamálaráðið** 20% svarandi til kr. 1,9 mió kr.

## Bridge

Leygardagin 12. februar 2005 verður árliga steypakappingin í bridge leikt í Bridgehúsinum í Havn. Kappingin, ið byrjar kl, 10.00, verður skipað sum ein miniliðkapping. Freistin at boðar frá luttøku er fríggjadagin kl 12.00, á telefon 744741.

Vinnandi liðið vinnur 4 ferðaseðlar, ið skulu nýtast til risastóru donsku bridge vikuna, sum verður hildin í Vejle í summar.

## Árliga stórkappingin nærkast

Seinni í hesum mánaðinum verður árliga stórkappingin í fimleiki. Sum vanligt eru tað bæði tey yngru og tey eldru liðini, ið fara at kappast. Kappingin hevur verið eitt afturvendandi tiltak seinnu árini, og undirtøkan millum fimleikarar hevur verið sera góð.

Í ár verður kappingin í Ítróttarhøllini á Hálsi, og kappast verður í vikuskiftinum 26. og 27. februar.

**tn**